# Jól uttan tykkum



Hesi jólini vóru tey fyrstu uttan tykkum.

Innaní kennist tað so tungt og sorgarbundið, og eg sakni tykkum so nógv.

Tit fóru bæði ísenn. Nú er tøgn, og fjálga stovan hjá tykkum stendur tóm.

Men eg havi góð minnir at verma meg við.

Minnir frá jólahøgtíðini, táið vit vóru børn. Mamma, eg hoyri teg stákast, og meðan tú titar gjøgnum trappurnar, murrar tú onkran av teimum gomlu sangunum, sum tú elskaði so nógv.

Seinni, tá ið eg hevði fingið mítt egna, komu tit mangan suður til okkum at halda jól. Tú gavst mær góð ráð um, hvussu man brúnkar eplir og gjørdi eina góða karamellsós.

Pápi sat í einum horni og spældi kort við okkurt av abbabørnunum – hann elskaði tað, og tey ikki minni.

Bara tykkara nærvera gav kensluna av, at nú er jól.

Nú eru hetta kær minnir.

Mamma! áh, sum eg sakni at kunna ringja til tín.

Tú vart altíð í mínum parti, tá ið tað tyktiskt sum um at øll vóru ímót. Tú uggaði altíð - troystaði tá ið dalurin kendist djúpur. Nú er røddin tagnað.

Tú vart so hugnalig - altíð okkurt nýbakað, altíð umfevnandi, tú vart góð við øll og dugdi við øllum.Tú gjørdi ongan mun á fólki.

Tú tænti øllum, og sat ikki og bíðaði eftir at verða uppvartað.

Pápi góði, eg veit at tú hevði ynskt at kunna forða hesi vanlukku, men her náddi tú tað ikki. Hesaferð kundi tú ikki bara ”orna tað”. Tú sum altíð kláraði alt. Í viðgongd og mótgongd - altíð tann sami.

Eg sá so nógv í tær. Tú visti alt, men ongantíð rættaði tú uppá meg ella segði hvat eg skuldi gera. Tú lat meg sjálva taka avgerðir og skapa mítt lív. Takk fyri tað frælsi og álit tú vísti mær.

Tykkara lívsleið varð so væl lýst við jarðarferðina. Tit møttust sum heilt ung, óvitandi um hvussu lívið fór at forma seg. Lyfti sum tit góvu hvørt øðrum tá tit giftust, ”til deyðin tykkum skilir”, fekk ein øðrvísi týdning. Tit fylgdust út úr hesum heimi, inn til eitt ævigt lív.

Ein yrking hjá verfaðir, Petur Háberg, sigur:

*Hin tunga sorgin snýkti,*
*seg inni mangt eitt heim,*
*men Harrans ríka náði ,*
*sum áður vísti teim.*
*Teir allar tyngstu dagarnar*
*Harrin sjálvur bar,*
*og øllum sínum verja*
*í trongdar døgum var.*

Jólini vórðu hildin uttan tykkum í ár, men í huganum vóru tit nærri enn nakrantíð fyrr.

Og tit verða goymd í tí hjartarúminum, har ongin kann ræna tykkum frá mær.

**Anna**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Óli Hansen Nes**, vanliga nevndur Óli á Forð, fer til gravar úr Fríðrikskirkjuni, fríggjadagin 28. desember kl. 13.00. Tey sum vilja minnast Óla Hansen, kunnu lata eina peningagávu til Ellis og Røktarheimið, konta í peningastovnum.

**Sanna í Soylu av Sandi** andaðist á Áargarði 2. jóladag, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Sands kirkju sunnudagin 30. desember kl. 13. Tey, sum vilja minnast Sannu, kunnu geva eina gávu til Sands kirkju. Sungið verður úr sálmabókini.

**Sámal Júst Bjartalíð** fer til gravar úr Kristianskirkjuni fríggjadagin 28. desembur kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Torbjørn Djurhuus, Tvøroyri** fer til gravar úr Tvøroyar kirkju leygardagin klokkan 13.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg á 80 ára degnum 17. august 2007.
Takk fyri gávur, blómur, telegramm og tit, sum ringdu.
Ein serlig tøkk til tykkum, sum vitjaðu meg úr Føroyum.

Eitt Harrans vælsignað nýggjár ynski eg tykkum øllum.

**Blíðastu heilsanir**
**Elma Bech, Bisserup**

Fyri 35 árum síðan:

# Stórur skaði av ódnarveðri

Náttina fyri nýggjársaftan í 1972 var satt ódnarvegur í Føroyum. Ein útsynningsódn herjaði og gjørdi um seg fleiri staðir kring landið. Stórir skaðar hendu t.d. í Klaksvík, Funningsfirði og í Havn.

Í Klaksvík fór t.d. takið av nýggju telefonstøðini, í Havn fór ein partur av Ítróttarhøllini á Hálsi og í Funningsfirði fóru eini sethús heilt illa, ein bussur bóltaði 30 metrar oman av vegnum, lendingin fór illa og fleiri telefon- og elsteyrar brotnaðu.

*Kelda: Myndaárbókin árið ið fór 1973*



*Húsini hjá Meinhardi Hansen í Funningsfirði fóru heilt illa í ódnarveðrinum fyri 35 árum síðan*

**Dagurin**
**29. desember. Nóa.** Dagur til minnis um mannin, sum gjørdi ørkina (1. Mós. 6-9).

## Tøkk



Vit takka tykkum hjartans tøkk fyri farnu tíð, sum tit hava víst okkum, tá vit vóru í Føroyum.
Takk fyri allan stuðul og bøn tykkara fyri okkum.
Vit ynskja tykkum eitt av Harranum eydnuberandi nýggjár við ynski um Harrans ríku signing.

*Virðingarmest við 1. Pæt. 1:3-5.*

**Anne & Jan Tausen Zachariassen, trúboðari ímillum tey deyvu í Danmark**